# Andreas skal til royndarvenjing í Frem

Leirvíkingurin, Andreas Lava Olsen, fer seinni í vikuni til danska felagið Frem at royndarvenja. Umboð fyri Frem hava gjøgnum summarið, verið í Føroyum og hugt eftir Andreasi. Teir mugu ivaleyst hava dámt tað teir sóu, tí hann hevur fingið boð til Danmarkar í næstum. Andreas Lava Olsen er kendur sum ein sera kvikur spælari og máltevinum feilar als onki heldur. Andreas

# Mamma Hareide doyði áðrenn dystin í Bosnia

Spælararnir kendu ikki til sorgina hjá landsliðsvenjaranum. Dagin fyri 2-0 sigurin hjá Noregi í Bosnia doyði mamma landsliðsvenjaran Åge Hareide, hon gjørdist 89 ára gomul. Fyrrverandi Brøndby-venjarin valdi ikki at siga spælarum sínum frá áðrenn dysturin var liðugur. Sambært norska blaðnum Aftenbladet ynskti Hareide ikki at tosa um at mamman doyði gjárkvøldið, tí hann ikki hevði tosað við familjuna, og annars vildi halda innan familjunnar fýra veggir.

# t tapa 5-0

disiplineraðir frá okkara síðu.

Álopini floymdu oman móti Jákup Mikkelsen, innleggini vóru mong og skotroyndirnar nógvar. Men bert einaferð var veruligur vandi á ferð. Góðir tíggju minuttir vóru spældir. Ukraina hevði higartil roynt at brotið ígjøgnum í síðunum, uttan hetta var hepnast teimum serliga væl. Hesaferð royna teir so at fara ígjøgnum mitt á. Tað eydnast og brádliga er Jákup Mikkelsen einsamallur við einum ukraina. Royndi málverjin fær í evstu løtu takla bóltin burtur við hondini, og vinnur samstundis henda tvídystin. Ógvuliga væl vart fyri, og Føroyar vóru framvegis við í dystinum. Undan hesum var Mikkjal Thomassen farin út. At síggja til sami skaði sum hann hevur havt: hælsinan. Útskiftingin tóktiskt tó ikki at órógva føroyska spælið. Ella kanska heldur føroyska verjuspælið, tí frameftir vøllinum var tað ógvuliga avmarkað, ið føroyingarnir komu við. Teir tóku heldur ongar kjansir. Ein mynd, ið lýsir hetta væl, er frísparksstøða miðskeiðis í fyrra hálvleiki. Bólturin liggur beint frammanfyri miðstrikuna. Aftanfyri hana standa fimm føroyingar. Uppi við brotsteigin hjá Ukraina standa aðrir fimm føroyingar, klárir at taka ímóti. Einki spurdist burtur úr hesum.

Tað tóktist tó sum um, at føroyingar høvdu fingið tað burtur úr, at Ukraina hesa løtuna ikki koyrdi við heilt somu ferð, tá fyrri hálvleikur var hálvrunnin.

## Níggju svartir minuttir

Vit runda nú teir 40 minuttirnar og higartil feilfría føroyska kollektivið ger sín fyrsta feil. Tann annars vælspælandi debutanturin, Johan Troest Davidsen, verður fangaður á skeiva beininum av Kalinichenko. Hesin sneiðir inn um Johan, sum onga hjálp fær aftanfyri seg hesa løtuna, inn í brotsteigin og smekkar til. Skotið tekur í Óla Hansen, broytir kós og Jákup Mikkelsen er prísgivin.

Hálvan minutt seinni dummar Einar Hansen seg í hinum borðinum. Við bringuni roynir hann at leggja bóltin aftur til Jákup Mikkelsen, sum tó er alt ov langt burtur. Gusiev kemur í millum, Jákup Mikkelsen er seldur og málið tómt. 2-0!

Minuttin fyri steðgin er aftur galið. Skotið verður hart úti frá móti Jákup Mikkelsen. Hann megnar ikki at halda skotinum, Gusiev er kvikur á returinum og so er 3-0.

Hvat Jógvan Martin Olsen hevur sagt við leikarararnar í steðginum er fyri so vítt undir ordnað. Tí seinni hálvleikur er bara tríggjar minuttir gamal, tá støðan gerst 4-0. Neyvan tað, ið føroyska liðið ætlaði at byggja seinna hálvleik á. Kalinichenko sleppur at standa púra leysur eftir frísparksinnlegg úr høgru, og so er lætt hjá honum at skora.

Upp á níggju minuttir hevur Ukraina skorað fýra mál – tað er flott!

Fimta málið – fyri nú at taka tað beinanvegin – er eisini eitt innlegg. Hesaferð úr vinstru, flatt til handaru stong har Kalinichenko aftur var framvið. Føroyska verjan vildi vera við, at Kalilichenko var rangstaddur, men málið var góðtikið.

## Føroysku kjansirnir

Hóast tað var einvegis ferðsla mest sum allan dystin, eydnaðist tað føroyingum at skapa nakrar vandamiklar støður. Fyrsta málroyndin frá okkum, var eitt vánaligt langskot frá Símuni Samuelsen, eftir eitt annars fínt álop. Christian Høgni Jacobsen fekk okkara næsta møguleika, tá Rógvi Jacobsen spældi hann leysan, men vinkulin gjørdist ov spískur. Eisini Holst spældi Christian Høgna lesyan við einum dreymi av einum stikningi, men runavíkingurin varð runnin aftur av verjuni. Christian Høgni Jacobsen fekk eisini ein triðja møguleika, tá Símun Samuelsen sendi tvørtur um vøllin, men tað tóktist koma so óvart á hann, at hann ikki fekk tamarhald á bóltinum.

Seinastu føroysku royndina við biti í átti Christian Lamhauge Holst, tá sendi eitt kanónskot beint framvið málinum.

Meðan hatta vóru føroysku royndirnar á málið hjá Pyatov, høvdu hansara liðfelagar nógvar naskar royndir móti Jákupi Mikkelsen í hinum endanum. Men fleiri mál komu ikki.

## Betri enn seinast

Hvat so? Enn eitt stórtap, men kortini var úrslitið betri enn seinast. Frá 6-0 til 5-0. Tað kunnu vit ikki brúka til so nógv. Tað vit kunnu brúka er, at innsatsurin frá føroyska liðnum var framúrskarandi. Menn vildi og menn strýddust. At Ukraina, Blokhin, Gusiev og Kalinichenko vildu tað øðrvísi, fáa vit ikki gjørt so nógv við. Eftir tapið leygardagin reististist Ukraina. Tað gjørdi føroyska liðið fyri so vítt eisini.



*Atli Danielsen spældi rímuliga væl á miðvøllinum milukvøldið, men lítið munaði*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Føroyingar høvdu mangan trupulleikar av skjóta, og tekniskt góða Andriy Voronin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*